## Bót fyri ikki at møta til avtalur á Ríkissjúkrahúsinum



Á Ríkissjúkrahúsinum vóru í fjør upp ímóti 25.000 fólk, sum ikki møttu til avtaluna, tey høvdu á Ríkissjúkrahúsinum uttan at geva avboð. Nú er eitt nýtt uppskot á lofti um, at hetta framyvir skal kosta eina bót. Sagt verður, at tað er beinleiðis ófólkaligt ikki at taka telefonina og ringja avboð, tá tað ikki ber til at møta til ásettu tíðina. Kristen Lee frá De Radikale sigur, at okkurt má gerast fyri at broyta vanarnar hjá fólki, og tað lættasta er at senda eini boð ígjøgnum pengapungin. Men fleiri sjúklingar hava nú tikið til orðanna, og hava sagt, at tað er nærum vónleyst at ringja til Ríkissjúkrahúsið. Tað er vónleyst, og nógv geva upp eftir at hava ringt eini 10 ferðir, verður sagt. Tað skrivar DR.

# Kappingin um upsan í stóru

**Tað hevur verið sagt, at fiskimaðurin í dag er so bevístur um fiskaprísir, at eingin vandi er á ferð við kappingini, nú fiskavirkir hava keypt sær fleiri og fleiri skip fyri at tryggja sær rávøru og grundarlag. Fiskaseljari sigur, at hetta er ikki rætt, tí sjálvt ísfiskatrolarar, sum partrola, fáa ikki altíð sama prís fyri fiskin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Tað er ikki rætt, at tað onga ávirkan hevur á fiskaprísirnar og kappingina um ráfiskin, at fiskavirkir hava keypt sær fleiri skip. Fleiri dømir er um, at skip, sum hoyra undir virkir, fáa ein lægri prís fyri upsan enn skip, sum eru leys av virkjum.

Tað sigur fiskaseljari við Sosialin.

Hann vísir á, at tað enntá eru partrolarar, sum fáa ymiskan prís fyri sína veiði – alt eftir, hvør keyparin er.

- Tað er tí ikki rætt, at tað onga ávirkan hevur á fiskaprísirnar, at virkir hava keypt sær skip fyri at tryggja sítt rávørugrundarlag.

Fiskaseljarin vísir á, at tað eisini eru skip, sum ikki beinleiðis eru knýtt at virkjum, men kortini selja veiðina burtur av til ávís virkir, sum eisini hava fingið lægri fiskaprísir, enn marknaðarprísurin veruliga er.

- Vit hava soleiðis sæð, at prísmunurin millum søluna hjá skipum, sum burtur av selja til ávís virkir – og eitt nú makkara, sum selir á fría marknaðinum, hevur verið eini 50 oyru fyri kilo.

Hann sigur, at hetta er sami fiskur, sum eisini er hin sami til dygdar.

- Munurin er bara, at annað skipið selir burtur av til ávíst virki, meðan hitt selir, har mest fæst fyri fiskin.

Fiskaseljarin vísir á, at nú Kósin og Faroe Seafood liggja á einum so stórum parti av ráfiskinum, er vandin eisini tann, at smáir fiskakeyparar lítlan og ongan kjans hava at blanda seg upp í kappingina um fiskin.

- Eg haldi, at myndugleikarnir áttu at broytt lógina um vinnuligan fiskiskap aftur, soleiðis at allur fiskur, sum verður landaður í Føroyum, verður seldur um uppboðssølu.

Hann sigur, at soleiðis, sum støðan er, kunnu skip selja veiðina, har tey vilja, og tað er hetta, sum nú sæst aftur í fiskaprísunum hjá ávísum skipum.

- Við fiskapakkanum kom broytingin, at fiskur, sum fer óvirkaður av landinum, fyrst skal um uppboðssølu. Men kravið um, at ein ávísur prosentpartur av veiðini hjá hvørjum einstøkum skipi skal um uppboðssølu, liggur longri aftur í tíðini og er avtikið.

Fiskaseljarin heldur ikki, at núverandi skipan er nóg góð til tess at tryggja rættan avreiðingarprís og heldur, at neyðugt er við lógarbroyting.

- Útboðið við upsa er ikki alment, og keyparar hava ikki somu møguleikar og atgongd til fiskin. Hetta gongur útyvir kappingina um fiskin og soleiðis eisini inntøkurnar hjá skipum og manning.

Hann heldur, at nú virkini hava lagt fleiri og fleiri skip undir seg, eiga myndugleikarnir at seta vatntætt skott millum skip og virkir, sum tvingar allan ráfisk, sum landaður verður í Føroyum, um uppboðssølu.

- Tað er vorðið so aktuelt at tosa um tilfeingið sum ogn Føroya fólks, men við verandi skipan hava allir keyparar ikki sama møguleika at bjóða upp á fiskin, samstundis sum fiskimenn ikki fáa rætta marknaðarprísir, sigur fiskaseljarin, sum Sosialurin hevur tosað við.



# Beta-skip full undir lúkurnar við upsa

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Meðan nýggjastu skipini í føroyska fiskiskipaflotanum, Falkur og Heykur, enn dragast við onkrar »barnasjúkur«, áðrenn verulig gongd kann koma á hjá teimum, rokast hinir fýra ísfiskatrolararnir hjá Faroe Seafood á upsa.

Í gjár landaðu Stelkur og Bakur soleiðis sløk 400.000 pund, og í dag landa Rókur og Lerkur út við 420.000 pund.

Tað er landingarmiðstøðin í Saltangará, sum landar skipini.

Sagt verður haðani, at upsin, sum skipini hava fingið seinastu dagarnar, er rímiliga góður.

**Garnaskip**

Á landingarmiðstøðini vænta tey ikki fleiri upsaskip aftrat hesa vikuna, men okkurt garnaskip kemur væntandi inn at landa.

Ætlandi kemur Vesturland í morgin, og teir hava helst millum 14.000 og 20.000 pund av havtasku.




*Bakur og Stelkur og Rókur og Lerkur vóru reiðiliga fullir undir lúkurnar, tá ið skipini landaðu í Saltangará í dag og í gjár*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*